# ÁLIT UM HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐ

TÓRSHAVN SEPT. 1987

# INNIHALD


| | SÍÐA |
|---|---|
| INNGANGUR | 3 |
| SAMANDRÁTTUR | 5 |
| HJÁLPARTÓL | 7 |
| KANNINGIN | 13 |
| EIN FØROYSK HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐ | 25 |
| FÍGGJARÆTLAN | 35 |
| S K J Ø L: | 41 |
| I.Viðskiftafólk | 42 |
| II.Fundir og kanningarferðir | 44 |
| III.Bókmentir | 46 |
| IV.Ummæli frá stovnum | 49 |

# INNGANGUR

Ein hjálpartólamiðstøð í Føroyum, (í álitinum stytt til HTM) hevur í nógv ár verið eitt ynski hjá brekaðum og starvsfólki, sum dagliga fáast við at útvega hjálpartól.

Í 1975 setti Landsstýrið eina nevnd at arbeiða við málinum, men einki álit spurdist burturúr.

Í 1981 lat ein arbeiðsbólkur undir MBF eina frágreiðing um HTM frá sær. Frágreiðingin, sum er prentað í "Ár teirra brekaðu", vísir á tørvin og setur vegleiðandi krøv til stovnseting av einari HTM.

Í 1985 helt MBF eina ráðstevnu um viðurskifti hjá brekaðum í Føroyum. Ynskið um HTM varð aftur framført og Landsstýrið setti 200.000 kr. av til endamálið á fíggjarætlan Landssjúkrahúsins.

1.des.1986 setti Landsstýrið undirritaða sum leiðara á eini komandi HTM, og skrivstova varð útvegað á Háskúlavegi 5.

Ein partur av játtanini er nýttur til ergoterapeutin Lone Barkholt, sum síðani 1.apríl hevur hjálpt til við fyrireikingunum.

Í samráð við Jógvan Durhuus, landsstýrismann í heilsumálum, varð avgjørt at kanna verandi viðurskifti í Føroyum og kunna seg við royndir, sum gjørdar eru í Norðurlondum.

Við hesum grundarlagi skuldi uppskot gerast um stovnseting og virkisøki hjá einari føroyskari HTM.

Fyriliggjandi álit er úrslit av hesum kanningum og er ætlað Landstýrinum, Løgtinginum og annars øllum, sum hava áhuga fyri málinum.

## MANNAGONGD

Fundir eru hildnir við umboð fyri stovnar, sum fáast við hjálpartól, umboð fyri brúkarar og starvsfólk umboðandi ymiskar bólkar av brekum. (sí skjal II)

Tvær kanningarferðir eru gjørdar til Danmarkar og Noregs.(sí skjal II)

Fyri at meta um tørvin á veitingum frá einari Hjálpartólamiðstøð í Føroyum, er ein spurnaðarblaðskanning gjørd.

Samstarv er fingið við hjálpartólastovnar í Norðurlondum. Rúgvismikið tilfar er savnað og gjøgnumgingið.(sí skjal III)

Í juni 1987 var uppskot til fíggjarætlan fyri 1988 og ein fyribils frágreiðing latin Landsstýrinum.

Ymiskir stovnar hava havt uppskotið um HTM til ummælis.(sí skjal IV)

At enda vil eg fegin takka øllum teimum mongu, sum við beinasemi og vælvild hava hjálpt til og víst málinum áhuga.

Tórshavn, 1. septembur 1987

Dánjal Pauli Haraldsen

# SAMANDRÁTTUR

**Hjálpartól**

Í fyrsta partinum verða nøkur fyribrigdi lýst: t.d. at hjálpartól, eru ein liður í medisinskari og sosialari rehabilitering og hevur sum høvuðsendamál at geva brekaðum javnbjóðis møguleikar at luttaka í samfelagslívinum.

Nevndar verða ymiskar orsøkir til støðugt vaksandi tørvin á hjálpartólum.

Tey ellisbrekaðu eru tey, sum nýta flest hjálpartól. Við hækkandi livialdrinum verða hesi lutfalsliga fleiri í tali. Hetta hevur m.a. ein vaksandi tørv á røktarstovnum við sær.

Hóskandi hjálpartól og/ella íbúðarbroytingar er ein týdningarmikil táttur í royndini at geva brekaðum møguleika at búgva heima sum longst og avlasta tey, sum hava røktina um hendur.

**Kanningin**

Kanningin av verandi skipan vísir, at tað er sera trupult at útvegað og fáa ráðgeving um hjálpartól. Serliga er hetta galdandi fyri heimabúgvandi rørslubrekað:

Tað vantar sakkunnleiki til økið.

Goymslurnar eru ov smáar og eingir møguleikar eru at læna tól til roynd.

Sum oftast skal bíleggjast úr Danmark, og útveganartíðin er long.

Tað vantar ein skipað endurnýtsla.

**Ein føroysk HTM**

Í álitinum verður greitt frá, hvussu mannagongdin kann gerast einfaldari, og hvussu ein HTM eigur at skipast, um vansarnir við verandi skipan skulu basast.

HTM eigur at stovnsetast í Tórshavn og 6-7 smærri goymslur á bygd.

| | |
|---|---|
| Virkisøkið | Virksemið eigur at fevna um ráðgeving, upplýsing, undirvísing, framsýning og goymslu, og skipað eigur at verða fyri landsfevnandi endurnýtslu.<br><br>HTM eigur at verða innkeypsmiðstøð fyri heimabúgvandi, stovnar og sjúkrahús.<br><br>Virksemið eigur í fyrstu atløgu at avmarkast til rørslubrekað og inkontinent. |
| Starvsfólk | Starvsfólkatalið, sum skotið er upp, **er munandi lægri** enn á samsvarandi stovnum aðrastaðni og tað verður trupult at fáa HTM at virka eftir sínum endamáli, um uppskotið verður skert.<br><br>Skotið er upp at játta 5 starvsfólk í 1988 umframt setta leiðarin:<br><br>2 terapeutar<br>1 skrivstovufólk<br>1 teknikara<br>1 goymslufólk |
| Høli | Mett er, at 550 m² eru neyðugir frá byrjan og uml. 850 m² eftir einum tíðarskeiði.<br><br>Um høli verða útvegað 1.febr. og starvsfólkini sett 1 mars kann HTM lata upp 1.maj 1988. |
| Fíggjarætlan fyri 1988 | Rakstur 2.265.000 kr. Íløga 2.075.000 kr. |

TILRÁÐINGAR

Mælt verður til:

at HTM verður stovnur undir landinum,

at seta 5 starvsfólk í 1988,

at útvegað 550 - 850 m² til høli,

at tryggja fíggjarligt grundarlig undir HTM og seta uppskotnu upphædd á fíggjarløgtingslógina 1988,

at reglugerð fyri stovnin verður gjørd.

# HJÁLPARTÓL

Ein lýsing av nøkrum viðurskiftum, sum eru viðkomandi, tá talan er um útvegan av hjálpartólum.

HVØRJUM TØRVAR HJÁLPARTÓL ?

HVAT MERKIR HJÁLPARTÓL ?

HVÍ ÚTVEGA HJÁLPARTÓL ?

TØRVURIN ER VAKSANDI

HVAT ER EIN HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐ ?

HVAT ER MÁLSVIÐGERÐ ?

HVØR FÍGGJAR VIRKSEMIÐ ?

NYTTU/KOSTNAÐARMETINGAR

# HJÁLPARTÓL

## HVØRJUM TØRVAR HJÁLPARTÓL ?

Tey, sum hava hjálpartól fyri neyðini, eru sum heild tey, vit við einum felags heiti kalla brekað. Brekið kann ein vera føddur við ella tað er komið av skaða, sjúku ella elli.

Eitt brek kann metast í mun til tað, vit kalla "normalt", t.d. niðursett megi í einum beini.

Er talan um hjálpartól, er tó betur at nýta hesa lýsing:

**Brek**

Eitt brek er munurin ímillum tær funktiónstreytir, ein persónur hevur, og tey krøv, umhvørvið setur til hann.

Ein, sum hevur ilt við at ganga trappur, vegna niðursetta megi í einum beini, er eftir hesari lýsing ikki brekaður í einum húsum uttan trappur.

## HVAT MERKIR HJÁLPARTÓL ?

Umframt ymiska viðgerð, sjúk og brekað leita sær, kunnu teknisk tiltøk av ymiskum slag vera ein ábót, og kunnu tey lýsast soleiðis:

**Teknisk tiltøk**

Teknisk tiltøk til brekað gera munin millum funktiónsfortreyt og krøv frá umhvørvi minni, tað veri seg í heimi, í skúla, á arbeiði ella í frítíð. Hesi tiltøk kunnu býtast í:

Kropstøtt hjálpartól

Kropstøtt hjálpartól bøta ella eru ístaðin fyri ein brekaðan likamslut, t.d. hoyritól, brillur og protesur av ymiskum slag.

Funktións-hjálpartól

Funktiónshjálpartól loysa praktiskar trupuleikar hjá brekaðum, t.d. koyristólur ella gongutól til rørslutarnað, hvítir stavir til blind ella teleslynga til deyv.

Tillaging av umhvørvi

Tillaging av umhvørvi snýr seg um íbúðarbroytingar og tillaging av skúlum, arbeiðsplássum, almennum og privatum bygningum og øðrum umhvørvi, so tað hóskar til brekað.

## HVÍ ÚTVEGA HJÁLPARTÓL ?

Útvegan av hjálpartólum og tillaging av umhvørvi hevur sum endamál at geva brekaðum javnbjóðis møguleikar at luttaka í samfelagslívinum. Hetta kann snúgva seg um:

at lætta um dagligu tilveruna hjá tí brekaða og teimum, sum varða av ella hava røktina um hendur

at klára seg uttan ella við minst møguligari hjálp frá øðrum

at búgva heima hjá sær sjálvum sum longst

at vera í vinnu ella í vanligum skúla.

Hjálpartól eru eitt lið í medisinskari og sosialari rehabilitering, í samband við røkt, undirvísing og tillaging av arbeiðsplássum.

## TØRVURIN ER VAKSANDI

Tørvurin á hjálpartólum er allastaðni í stórum vøkstri. Sum orsøk kunnu fleiri viðurskifti nevnast:

Tann parturin av fólki, sum tørvar flest hjálpartól, tey ellisbrekaðu, er í stórum vøkstri.

Almannalóggávurnar geva rúmari ræsir at fáa slíkar veitingar játtaðar.

Tey brekaðu eru sjálv farin at krevja at kunna luttaka í samfelagslívinum á jøvnum føti við ikki brekað.

Tøknfrøðisliga menningin hevur einki minni enn kollvelt hjálpartólamarknaðin. Útboðið er fleirfaldað, og møguleikarnir at bøta um brek við tøkni eru at kalla óavmarkaðir.

Hesi viðurskifti hava gjørt tað neyðugt at miðsavna vitan og royndir við hjálpartólum:

Seinastu tjúgu árini eru hjálpartólamiðstøðir stovnsettar í øllum norðurlondum.

Starvsfólk, t.d. ergoterapeutar, verða í kommununum sett at arbeiða við hjálpartólum burturav.

Statsligir ráðgevandi menningarstovnar eru stovnsettir t.d.:

Dansk Hjælpemiddel Institut í Danmark.

Rådet for tekniske tiltak for funksionshemmede í Noreg.

Handicapinstituttet í Svøríki.

## HVAT ER EIN HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐ ?

Ein hjálpartólamiðstøð er ein tænastustovnur, hvørs starvsfólk eru serkøn í hjálpartólaspurningum, og er miðdepilin í veitingum av hjálpartólum fyri eitt øki. Vanliga avmarkar virksemið seg til funktiónshjálpartól og tillaging av umhvørvi.

Vanligar uppgávur eru: ráðgeving, undirvísing, framsýning, innkeyp, søla, goymsla og fyriskipan av endurnýtslu av hjálpartólum.

## HVAT ER MÁLSVIÐGERÐ ?

Málsviðgerð er tíðarkrevjandi partur av hjálpartólavirkseminum. Tann, ið hevur málsviðgerðina um hendur, skal staðfesta tørvin fyri tann brekaða. Hetta kann snúgva seg um:

Innsavning av læknaligum og sosialum upplýsingum

Eina ella fleiri heimavitjanir

Roynd av tólum og møgulig tillaging

Leiðbeining í nýtslu og viðlíkahaldi

Frágreiðing, kostnaðarmeting og hjálp til umsøkn til játtandi myndugleikar

Hjálp til bílegging og útflýgging

## HVØR FÍGGJAR VIRKSEMIÐ ?

Vanliga, t.d. í Danmark, verður rakstur av hjálpartólamiðstøðum fíggaður av stati og amtskommunu.

Hjálpartólini verða fíggjað yvir "Bistandsloven § 58 og 59" ella fyriskipanir fyri skúlar, stovnar og sjúkrahús.

## NYTTU/KOSTNARMETINGAR

At meta nágreiniliga um inntøku- og útreiðslusíðuna av hjálpartólavirksemi er torført.

Hjálpartólavirksemið er fyrst og fremst ein spurningur um, hvat tænastustøði eitt samfelag avger at veita sínum brekaðu borgarum. Hetta er ein spurningur um "lívsvirðir" hjá tí brekaða, sum fá hætta sær at seta ein prís á.

Tó vísa kanningar, at útveging av tekniskum tiltøkum til brekað kunnu minka um tørvin til aðrar almennar veitingar, t.d.:

Pláss á røktarstovnum og sjúkrahúsum.

Heimahjálp og heimasjúkrasystrar.

Avlamispensión.

Flutningsskipanir til brekað.

Veitingar til røktarfólk og avvarðandi, sum verða sjúk ella fáa arbeiðskaðar í samband við røkt.

# KANNINGIN


| | SÍÐA |
|---|---|
| LÓGIR, SUM HEIMILA HJÁLPARTÓL | 14 |
| HJÁLPARTÓL TIL RØRSLUBREKAÐ | 14 |
| SPURNAÐARBLAÐSKANNINGIN | 16 |
| HJÁLPARTÓL TIL BÓLKAR VIÐ SERLIGUM BREKUM | 18 |
| ÚTREIÐSLURNAR AV HJÁLPARTÓLAVIRKSEMINUM | 20 |
| ROYNDIR ÚR NORÐURLONDUM | 21 |
| NIÐURSTØÐA | 23 |

# KANNINGIN

Niðanfyri verður greitt frá, hvussu mannagongdin er í dag, tá hjálpartol verða útvegað. Ymiskir bólkar av brekum eru viðgjørdir hvør sær, og ein meting av verandi skipan er gjørd.

## LÓGIR, SUM HEIMILA HJÁLPARTÓL

Í galdandi lóggávu eru ymiskir møguleikar fyri at fáa útreiðslur til hjálpartól og íbúðarbroytingar játtaðar.

| Fyriskipan | Játtandi mynduleiki |
|---|---|
| Avlamispensiónslógin | Vanlukku-tryggingaráðið (F.U.R.) |
| Forsorgarlógin | Almannastovan |
| Fólkapensiónslógin | Almannastovan |
| Avmarkingarsirkulerið | Sjúkrahúsini 1) |
| Fólkaskúlalógin | Landsskúlafyrisitingin |

1) Cirkulære om afgrænsning af behandlingsredskaber, hvortil udgiften afholdes af sygehusvæsenet, IM, Bek.nr.21, 20.2.1975.

## HJÁLPARTÓL TIL RØRSLUBREKAÐ

**Málsviðgerð**

Á sjúkrahúsum og størri stovnum eru tað vanliga fysio- ella ergoterapeutar, sum átaka sær at útvega hjálpartólini.

Í øðrum førum kunnu tað vera sosialráðgevarar, læknar, heimahjálparar ella heimasjúkrasystrar, tann brekaði sjálvur ella avvarðandi.

**F.U.R.**

Umleið 95% av hjálpartólum til varandi nýtslu verða játtað av F.U., sum umsitur avlamispensiónslógina.

F.U.R. er ráð, mannað við Sorinskrivaranum og Landslæknanum sum føddum limum og trimum politiskt valdum limum. Fundur er hvørja viku.

Er umsøknin fullfíggjað, fyriliggur svar vanliga eftir einari viku.

**Goymslur**

Tey tól, sum F.U.R. játtar, verða ikki miðvíst skrásett við tí endamáli at endurnýta hesi, um tey ikki verða nýtt. Summi tól verða tó latin inn aftur á sjúkrahús, røktarstovnar ella til eftirlitskvinnurnar hjá heimahjálpini.

**Bílegging úr Danmark**

Sum meginregla verða hjálpartól bíløgd frá donskum sølufyritøkum, ella í summum førum frá fa. Siri í Havn.

"Katalog tilfar" er sum oftast grundarlag undir bíleggingini, av tí at eingin framsýning av tólum finst í løtuni.

**Útveganartíðin**

Eitt vanligt mál kann fara soleiðis fram:

| | |
|---|---|
| Heimavitjan og umsøkn | 2 vikur |
| Viðgerð í F.U.R. | 1 viku |
| Bílegging frá sølufyritøku úr DK | 1 viku |
| Útflýgging | 2 vikur |
| Flutningur til Føroya | 1 viku |
| Avgreiðsla av skjølum | 1 viku |

Eitt slíkt mál kann soleiðis avgreiðast eftir uml. tveimum mánaðum. Nógv dømi eru tó um drúgvari mál, summi upp til eitt hálvt ár.

Ymisk viðurskifti kunnu leingja útveganar-tíðina: ivi hjá tí brekaða, hvar hann skal venda sær, bíðitíð eftir heimavitjan, noktan frá F.U.R., vøran er ikki á goymslu, ógreiða á, hvør hevur fingið skjølini, skeiv bílegging, so vøran skal sendast aftur osfr.

**Sjúkrahúsini**

Avmarkingarsirkulerið áleggur sjúkrahúsunum at veita øll neyðug hjálpar- og viðgerðartól til innløgd og í samband við útskriving.

Er talan um viðgerðartól ella tól til fyribils nýtslu, letur sjúkrahúsið tólið frá egnari goymslu.

Er talan um varandi tørv, skal umsøkn sendast F.U.R., og tólið verður so bílagt, tá játtanin fyriliggur.

Avmarkaðu goymslurnar og útveganartíðin gera, at sjúklingar í mongum førum mega vera fyri uttan heilt neyðug tól í longri tíðarskeið og at útskriving má útsetast, inntil eitt tól, t.d. ein koyristólur, er fingin til vegar.

**Aðrir stovnar** Røktar- og ellisheimini, Eirargarður og Skúlin á Trøðni eru teir stovnar, sum uttan fyri sjúkrahúsverkið útvega flest hjálpartól.

**Heimabúgvandi** Mannagongdin her er oftast, at tann brekaði og avvarðandi fáa samband við starvsfólk í primeru heilsu- og almannatænastuni. Tað kann vera heimahjálpin, heimasjúkrasysturin, ein sosialráðgevi ella kommunulæknin.

Mett verður um, hvør tørvurin er, og umsøkn verður send F.U.R.

Í summum førum verða terapeutar frá sjúkrahúsunum nýttir sum ráðgevarar fyri Almannastovuna.

Nevnast kann, at sjúkrahúsini, bæði terapideildir, goymslur og fyrisiting, siga seg verða ovbyrjað av slíkum fyrispurningum, sum í veruleikanum falla uttanfyri teirra øki.

## SPURNAÐARBLAÐSKANNINGIN

Kanningin fevndi um allar røktar- og bústovnar og øll viðskiftafólk hjá heimahjálp og heimasjúkrasystrum.

**Endamál** Kanningin hevði tvey endamál:

1. At fáa eina ábending av, hvussu nógvir fyrispurningar fara at verða, tá HTM letur upp.

2. At fáa ein leysliga meting av, hvussu nógv hjálpartól standa óbrúkt á teimum ymisku goymslunum.

Sjúkrahúsini hava eisini gjørt upp, hvussu nógv tól hjá F.U.R. tey hava á goymslu.

**1. Fyrispurningar tá HTM letur upp**

Fyrsti spurningurin ljóðaði: Tá HTM letur upp, fyri hvussu nógv av viðskiftafólkum tykkara høvdu tit vent tykkum til HTM viðvíkjandi:

| | Stovnar | Heimarøkt | Í alt |
|---|---|---|---|
| a.Meting av tólum íð eru útvegað? | 112 | 92 | 214 |
| b.Ráðgeving um útveging av nýggjum tólum? | 76 | 52 | 128 |
| c.Heimavitjan av terapeutum viðv. íbúðarbroytingum? | - | 71 | 71 |

**2. Tól á goymslu**

Uppgerðin fevnir um hjálpartól, sum F.U.R. hevur játtað, og sum standa á goymslum á stovnum, sjúkrahúsum og hjá eftirlitskvinnunum hjá heimahjálpini.

| | |
|---|---|
| Koyristólar | 62 |
| Baði/WC stólar | 7 |
| Lyftir | 3 |
| Røktarsengur | 9 |
| Madrassur | 11 |
| Onnur tól | 23 |

Tólini, serliga koyristólarnir, sigast sum heild at vera ótíðarhóskandi og uppslitin.

**Niðurstøða**

Ávís fyrivarni eiga ivaleyst at vera tikin fyri hesum tølum, men tey geva tó nakrar ábendingar:

Tørvurin á HTM er eyðsæddur.

Tørvurin hjá teimum, sum kanningin fevnir um, svarar til 3-400 mál. Herafturat koma so veitingar til sjúkrahúsini, brekað uttan heimahjálp og aðrir fyrispurningar.

Hjálpartólini á verandi goymslum umboða ikki nakað týðandi virði.

## HJÁLPARTÓL TIL BÓLKAR VIÐ SERLIGUM BREKUM

**Sjónsbrekað**

Eygnalæknin vísir fólkið til sjónsráðgevingina á Landskúlafyrisitingini ella til optikara.

Í serligum førum verða fólk send á Statens Øjenklinik í Danmark.

Í Blindafelagnum er blindakonsulentur, sum hevur ávís hjálpartól. Henda skipan fevnir ikki um tann stóra bólkin av sjónsveikum eldri fólki.

Eygnalæknin og sjónsráðgevin á Landsskúlafyrisitingini hava gjørt eitt uppskot til at stovnseta eitt hjálpartólasavn. At slíkum savni eigur serkøn ráðgeving at verða tilknýtt.

Í uppskotinum verður mælt til, at savnið og ráðgevingin verða skipað sum sjónsdeild á HTM eftir norskari fyrimynd.

Nakrir spurningar eru eftir at greiða og verður tí bíðað eftir at senda Landsstýrinum hetta, inntil uppskotið er fullfíggjað.

**Hoyri- og talubrekað**

Oyrna-, næsa- og hálslæknin vísir fólkið til hoyriklinikkina á Skúlanum á Trøðni, sum hevur hoyritól og hjálpartól um hendur. Samstarv er við hoyri- og taluráðgevingina á Landskúlafyrisitingini, sum eisini veitir ráðgeving til fólk yvir skúlaaldur.

Eingin framsýning av hjálpartólum finst, og veitingarnar á hesum økjum eru avmarkaðar.

1.jan.1988 verður Skúlin á Trøðni fyrisitingarliga lagdur undir Landsskúlafyrisitingina.

Ætlan er at stovnseta hoyriklinikk í samband við at Landssjúkrahúsið verður umbygt.

Talu-, hoyri- og sjónsráðgevararnir og terapeutar innan fólkaskúlan koma saman við øðrum virksemi at húsast á Landsmiðstøðini fyri undirvísingarambоð, sum enn ikki er upplatin.

Høli eru útvegað og leiðari er um at vera settur, men virkisøkið er enn ikki heilt avmarkað.

Frá brúkarum og starvsfólki verður víst á, at tørvur er á eini framsýning av hjálpartólum til hoyru- og talubrekað.

Mælt verður til gjøllari samráðingar og samskipan av virkisøkinum stovnanna millum, áðrenn støða verður tikin.

Um ein framsýning skal skipast, eigur hendan at leggjast, har sum flest fáa gagn av henni.

**Incontinent**

Stórar upphæddir verða árliga nýttar til ymiska útgerð til fólk, sum eru inkontinent, tvs. hava trupulleikar at halda vatninum.

Sentralgoymslan á Landsjúkrahúsinum letur útgerð til sjúkrahúsini og stovnar og til sjúklingar í samband við útskriving.

Apotekini og fa. Siri selja heimabúgvandi brúkarum útgerð og veita ráðgeving til tey, sum venda sær tann vegin. Hesar skipanir metast ikki at nøkta tørvin.

Ov litil vitan á hesum øki er til ampa fyri brúkaran og hevur ovurnýtslu og beinleiðis skeiva nýtslu við sær.

Ein framsýning eigur at skipast á HTM og ein sjúkrasystur at setast sum ráðgevi.

**Stomi- og bróstskurð-viðgjørd**

Felagið móti krabbameini hevur sjúkrasystir ráðgeva á hesum økjum. Apotekini, fa. Siri og Sentralgoymslan á Landssjúkrahúsinum lata vørurnar.

Skipanin verður mett sum vælvirkandi og ongi ynski eru um, at HTM skal átaka sær virksemið á hesum økjum.

**Ortopedisk hjálpartól**

Klaksvíkar sjúkrahús hevur avtalu við danskar bandagistar, sum útvega hesi hjálpartól.

Bandagistarnir eru í Føroyum sættu hvørja og hava viðtalu í Havn og í Klaksvík.

Ortopedisk hjálpartól falla sum heild uttanfyri virksemið hjá HTM, men tætt samstarv er ynskiligt.

Gerst ein Føroysk Bandagistskipan veruleiki, sum ivaleyst er ynskiligt, kundu viðtaluhøli við fyrimunum verið á HTM.

## ÚTREIÐSLURNAR AV HJÁLPARTÓLAVIRKSEMINUM

Vegna vantandi skráseting er sera trupult at gera sær metingar av útreiðslunum við verandi skipan. Ein meting má fevna um hesi øki:

1. Beinleiðis útreiðslur, sum standast av útveging av hjálpartólum og stuðli til íbúðarbroytingar

2. Óbeinleiðis útreiðslur, t.v.s., útreiðslur sum standast av málsviðgerð og umsiting.

**Beinleiðis útreiðslur**

Almannastovan upplýsir, at útreiðslurnar til hjálpartól sbrt. Avlamispensionslogina kap.7, § 31 í 1986 vóru **3.195.000 kr.**

Henda upphædd metist at svara til 95% av øllum veitingum til varandi nýtslu.

Hetta merkir, at Forsorgar-, Fólkapensións- og Fólkaskúlalógin í dag bert nýtast í einstøkum førum til játtan av hjálpartólum.

Hjálpartól á sjúkrahúsum og stovnum til fyribils útlán eru ikki frámerktar í rakstrinum.

**Óbeinleiðis útreiðslur**

Á sjúkrahúsum og stovnum verður sagt, at nógv orka fer til málsviðgerð, goymslu og umsiting.

Í primera almanna- og heilsuøkinum snýr tað seg um:

Umsiting á Almannastovuni

Raksturin av F.U.R. (uml. 1.mió. í 1988)

Læknaváttanir

Free-lance terapeutráðgeving fyri F.U.R. og Almannnastovuna

Málsviðgerð og umsiting hjá heimahjálpum og heimasjúkrasystrum, sosialráðgeving osfr.

Ein vælvirkandi HTM, fer at broyta útreiðslumynstri, men meira um hetta á síðu 33.

## ROYNDIR ÚR NORÐURLONDUM

Føroyar eru seinasta norðurland, sum fær eina hjálpartólamiðstøð. Sostatt skuldu allir møguleikar verið til staðar at lært av royndunum, hini londini hava gjørt.

Svensku, íslendsku, donsku og norsku skipaninar eru sammettar.

Viðurskiftini í Danmark og Noregi metast best egnað sum fyrimynd og eru kannað gjøllari.

**Noreg**

Aftaná sera nágreiniliga fyrireiking settu norðmenn í 1979 hjálpartólamiðstøðina i Telemark fylke á stovn. Útbyggingin í restini av landinum er framd við støði í hesum royndum.

Serstakt fyri Noreg er, at umframt hjálpartól til rørslutarnað eru serligar sjóns-, hoyru- og taludeildir á hjálpartólamiðstøðunum.

Serkøn innan hvørt øki veita hjálpartól, tá brúkarin er medisinskt avgreiddur. Sostatt veita tey ikki hoyritól, brillur, linsur o.l., men beinleiðis funktiónshjálpartól.

Telemark, 160.000 fólk

Vøksturin av útvegaðum hjálpartólum fyri hvørja deild sæst á hesum yvirliti:

| | 1980 | 1985 |
|---|---|---|
| Rørsludeild | 478 | 3228 |
| Sjónsdeild | 98 | 244 |
| Hoyrudeild | 98 | 499 |

Tað sæst, at hjálpartól til rørslubrekað umboða 80% av samlaðu veitingum, sum hesi fimm árini eru nærum sjey-faldaðar.

Sama tíðarskeið er útreiðslan fyri hvørt hjálpartól minkað niður í eina helvt. Orsøkirnar eru:

Miðsavnað innkeyp við avsláttri uppá 25 % í meðal.

Miðvís endurnýtsla.

Í 1986 mettu teir virðið á útlántum tólum, sum vóru í nýtslu, til 50 mió kr.

**Danmark**

Í 70'unum heitti Amtsrådsforeningen á øll amt um at stovnseta hjálpartólamiðstøðir.

Hjálpartólamiðstøðirnar veita bert tól til rørslubrekað og ráðgeving innan øki inkontinens. Hini økini eru umboðað á serligum stovnum sum t.d. Blindeinstituttet.

Í hvørjari kommunu starvast sokallaðir "saksbehandlaraterapeutar", sum hava málsviðgerðina fyri tey heimabúgvandi um hendur.

Hjálpartólamiðstøðirnar verða roknaðar sum amtskommunalir tænastustovnar og veita ráðgeving, undirvísing og hjálpartól til brúkarar og starvsfólk í kommununum.

Ringkøbing
260.000 fólk.

Í nýggjari kanning frá Dansk Hjælpemiddel Institut metist skipanin í Ringkøbing at vera fyrimyndarlig, serliga viðvíkjandi endurnýtslu- og innkeypskipanina.

Útvegað hjálpartól (í 1000)




Tað sæst, at 80 % ella 8 út av 10 av tólunum stava frá endurnýtslugoymslum.

Veitingarnir 1976 - 1980 er ikki skrásettar.

## NIÐURSTØÐA

Kanningin hevur staðfest týðandi vansar við verandi hjálpartólaskipan.

Serliga eru tað heimabúgvandi rørslubrekað og starvsfólk í primera almanna- og heilsuøkinum, sum kenna seg sleptan upp á fjall.

Men eisini starvsfólkum á stovnum og sjúkrahúsum tørvar eitt stað at venda sær og eina einfaldari útveganarskipan.

**Rørslubrekað**

Fyri hjálpartól til rørslubrekað, sum metast at umboða uml. 80% av øllum funktiónshjálpartólum, gera hesi viðurskifti seg galdandi:

Hjálpartólini á verandi goymslum er fá og ótíðarhóskandi.

Tað vantar ein miðvís endurnýtsluskipan.

Ov ofta verða beinleiðis óhóskandi tól útvegað, sum ongantíð koma í nýtslu.

Útveganartíðin kann vera frá tveimum mánaðum upp í eitt hálvt ár.

**Serligir bólkar av brekum**

Tilboð eru í dag til sjóns-, hoyru- talubrekað, stomi- og bróstopererað. Ávísar ábøtur kundu ivaleyst gerast, men uppskot um hesar krevja gjøllari kanning.

Tí eigur HTM í fyrstu atløgu at avmarka virksemi sítt til rørslubrekað og ráðgeving til inkontinent.

# EIN FØROYSK HTM


| | SÍÐA |
|---|---|
| STOVNSETING | 26 |
| UPPGÁVUR | 27 |
| AVMARKING AV VIRKISØKINUM | 28 |
| EINAFALDARI MANNAGONGD | 28 |
| STARVSFÓLK | 29 |
| HØLI | 31 |
| BYRJUNARÆTLAN FYRI HTM | 32 |
| AVLEIÐINGAR AV VIRKSEMINUM | 33 |

## STOVNSETING

**Landsstovnur**

Mælt verður til, at HTM verður landsstovnur í Tórshavn við egnari fíggjarætlan.

**Reglugerð**

So skjótt sum tann fyrisitingarligi spurningurin er greiddur, verður mælt til, at Landsstýrið áleggur leiðaranum á HTM at gera uppskot til reglugerð fyri stovnin.

**Fjargoymslur**

Seks til sjey goymslur, eini 20-30 m² hvør, eiga at avloysa verandi goymslur hjá heimahjálparum á bygd.

Goymslurnar eiga at verða lagdar samskipaðar við heimarøktarskipanirnar, og kundu t.d. ligið í samband við heilsumiðstøðir.

Fjargoymslurnar eiga at vera innlatingarstað av nýttum tólum og goymsla av brúkshjálpartólum til heimarøkt.



Hjálpartólamiðstøð ●

Fjargoymslur ✪

Sjúkrahús □

Størri stovnar △

Øki fyri heimarøkt ◿

## UPPGÁVUR

**Upplýsing, ráðgeving og undirvísing**

HTM eigur at átaka sær upplýsing, ráðgeving og undirvísing í hjálpartólaspurningum til brekað og starvsfólk innan almanna-, heilsu- og skúlaverkið. HTM eigur eisini at ráðgeva privatum og almennum byggiharrum í byggi- og býlispurningum.

**Framsýning**

HTM eigur at skipa fyri einari varandi framsýning av hjálpartólum og regluliga at fyriskipa serframsýningar um serlig evni eftir tørvi.

**Útlán**

HTM eigur at læna tól út til royndir. Harumframt eigur HTM at átaka sær útlán av tólum til fyribils nýtslu til sjúkrahús og stovnar.

**Endurnýtsla**

HTM eigur at fyriskipa endurnýtslu av tólum, sum verða lænt út ella játtað.

Eftir nærri avtalu eigur skipanin eisini at fevna um stovnar og sjúkrahús.




Myndin vísir streymin í eini landsfevnandi endurnýtsluskipan.

Endurnýtsluvirksemið hevur í sær móttøku, reingerð, umvæling ella burturbeining, útflýggjan og skráseting.

**Miðsavnað innkeyp**

HTM eigur at stíla fyri miðsavnaðum innkeypi av hjálpartólum. Stovnar og sjúkrahús kundu við fíggjarligum fyrimuni keypt tól gjøgnum HTM.

Virksemið hevur í sær prísavtalur við sølufyritøkur, avgreiðslu av farma-, toll- og fakturaskjølum, avheinting, goymslu, klárgering, tillaging og skráseting í endurnýtsluskipanini.

**Goymsla**

HTM eigur at fyrisita eina goymslu av innafturlatnum hjálpartólum og nýggjum brúkshjálpartólum. Sjáldsamari tól eiga at bíleggjast so hvørt.

## AVMARKING AV VIRKISØKI

**Rørslubrek og inkontinens**

Sum meginregla eigur HTM at avmarka virkisøki sítt til funktiónshjálpartól til rørslubrekað og ráðgeving í spurningum viðvíkjandi inkontinens.

HTM eigur at átaka sær málsviðgerð fyri heimabúgvandi, meðan stovnar og sjúkrahús eiga ábyrgd av málsviðgerðini fyri síni viðskiftafólk, men kunnu nýta HTM sum ráðgeva í truplum málum.

## EINFALDARI MANNAGONGD

Tann 1.januar 1988 verður umsitingin av kap.7 í avlamispensiónslógini flutt til Almannastovuna.

**HTM og Almannastovan**

Um ein hugsar sær, at eitt starvsfólk fekk fulltrú at játta rutinuumsøknir upp til eitt ávíst mark, og tætt samstarv fekst í lag millum almannastovuna og HTM, hevði mannagongdin í samband við umsøkn og játtan verið munandi einfaldari.

EDV samband til Almannastovuna hevði afturat hesum kunna rationaliserað umsitingina munandi fyri báðar stovnar.

## STARVSFÓLK

**Kritiskt minstamark**

Um endamálið við HTM er at loysa teir trupulleikar, sum eru við verandi skipan, er átrokandi, at HTM fær sømdir at røkja omanfyrinevndu uppgávur frá byrjan.

Í norskum kanningum verður eitt kritiskt minstamark nevnt fyri talið av starvsfólki á hjálpartólamiðstøðum.

Undir hesum marki miseyðnast tann tátturin í virkseminum, sum snýr seg um at aktivera starvsfólk, sum arbeiða við hjálpartólum lokalt. Hesi kunna, við miðvísari upplýsing og undirvísing, átaka sær hópin av rutinuuppgávum á staðnum.

Um HTM er undirmannað, verður høvuðsvirksemið álvarsliga tarnað av tíðarkrevjandi rutinuuppgávum, sum betur og skjótari vóru loystar lokalt.

**45 Starvsfólk í Ringkøbing**

Í Ringkøbing Amt búgva 260.000 fólk. Talið á teimum, sum fáast við hjálpartól burturav, er:

21 kommunalir saksbehandlaraterapeutar
8 terapeutar á HMC
7 skrivstovufólk á HMC
1 teknikari á HMC
4 teknikarar á hjálpartólaverkstaði

Á HTM vildi hetta svarað til uml. 9 starvsfólk.

Tað er tó ein royndur lutur, at ein minni eind krevur lutfalsliga fleiri starvsfólk og at ávíst grundvirksemið er tað sama, uttan mun til støddina.

Tað skuldi sostatt verið greitt, at starvsfólkatalið, sum skotið er upp fyri HTM, er **niðasta mark** fyri, at HTM kann megna at røkja sínar uppgávur.

**6 starvsfólk á HTM**

Av teimum seks starvsfólkunum, sum skotin verða upp, er bert leiðarin settur.

| Starvsfólk | Tímar/viku | Arbeiðsøki |
|---|---|---|
| Leiðarin | 40 | Daglig leiðsla, ábyrgd av fyrisiting, innkeypsavtalum og innan- og uttanhýsis menningararbeiði. |
| 2 terapeutar | 80 | Ráðgeving í málum viðv. útvegan, tillaging og brúki av hjálpartólum. Ráðgeving í byggimálum. Hetta hevur í sær arbeiði bæði sum málsviðgerari og sum ráðgevi. |
| 1 skrivstovufólk | 40 | Skrivstovuarbeiði, brøv, umsøknir, journalir, arkivering og arbeiði í móttøku.<br><br>Eitt vælkvalificerað skrivstovufólk kundi fingið ábyrgdina av EDV-skipanini. |
| 1 teknikari | 40 | Tillaging og umvæling av hjálpartólum. Stovnseting og viðlíkahald av eykalutsgoymslu. Serkønur í góðskumeting, innkeyp og burturbeining |
| 1 goymslufólk | 40 | Goymsluvirksemi, inn- og útpakking, sendingar til bygdirnar, reingerð av innkomnum tólum, skráseting o.a.m. |

## HØLI

**Sum byrjan 550 $m^2$**

Sum ein byrjan, ivaleyst í leigaðum fyribilshølum, eru minst 550 $m^2$ neyðugir. Hesir kunnu býtast sundur soleiðis:

| | |
|---|---|
| Móttøka/skrivstovur (6 starvsfólk) | 150 $m^2$ |
| Undirvísing | 50 $m^2$ |
| Framsýning | 200 $m^2$ |
| Verkstað/Reingerð | 100 $m^2$ |
| Goymsla | 1 00 $m^2$ |
| Íalt | 550 $m^2$ |

**Seinni 850 $m^2$**

Um egnað høli eru tøk, er tó best at útvega uml. 850 $m^2$ beinanvegin, sum verða neyðugir innan stutta tíð. Um aðrar deildir skulu vera á HTM, má fyrivarni takast fyri hesum.

T.d. krevur ein sjónsdeild uml. 50 $m^2$ afturat.

**Møgulig høli**

Landssjúkrahúsið kann ikki ávísa hóskandi høli.

Virksemið á HTM vendir sær eisini til so nógv onnur viðskiftafólk, at mælt verður til, at høli verða útvegað "í býnum".

1. Ein stovuhædd í einum av teimum størru bygningunum á Hálsi hevði ivaleyst verið vælegnað. Hugsað verður her m.a. um møguleikan hjá brekaðum at parkera og annars at røra seg ekkaleyst.

2. HTM kundi verið bygd á økinum hjá Tórshavnar kommunu í Gundadali í samband við ætlaðu læknamiðstøðina.

3. Landsmiðstøðin og HTM hava ávis samanfallandi virkisøki. Høli, sum kunnu hýsa HTM og Landsmiðstøðini fyri Undirvísingaramboð undir somu lon, er ein loysn, sum eisini eigur at umhugsast.

## BYRJUNARÆTLAN FYRI HTM

1.maj 1988

HTM kann lata upp 1.maj 1988 við hesum treytum:

Høli verða útvegað í seinasta lagi 1. febr. 1988.

Starvsfólkini verða sett í seinasta lagi 1. mars 1988.

**Virksemið á HTM**




Løgtingið viðger fíggjaætlanina 1988.

Tilfar frá sølufyritøkum verður skrásett.

EDV-skrá verður kannað.

EDV verður útvegað.

Leitað verður eftir hølum.

Hølini verða riggað til.

Lýst verður eftir starvsfólkum.

Starvsfólk verða sett og upplærd.

Flutt verður í nýggj høli.

